## TV 2 Radio letur aftur – starvsfólkini fáa sekkin

Tað fær nú avleiðingar, at danska sjónvarpsstøðin TV 2 hevur so stórt undirskot og so fáar lurtarar á nýggju útvarpsstøðini. DR skrivar í morgun, at nýggja útvarpsstøðin hjá kappingarneytanum letur aftur. Fyrrapartin í morgin fáa fólkini, sum skulu sigast upp, boð um tað. Næstan øll tey umleið 50 starvsfólkini fáa helst eitt uppsagnarbræv. Tað ljóðar, at TV 2 er farið undir samráðingar við Scandinavien Broadcasting System, SBS, sum helst fer at keypa útvarpsstøðina. TV 2 vónar, at støðin framhaldandi fer at lata tíðindi til útvarpsrásina.

## Havnarkórið konsert í Sandavágs Kirkju

Hósdagin komandi, Kristi himmalsferðardag, hevur Havnarkórið konsert í Sandavágs Kirkju. Havnarkórið hevur í seinni árum lagt seg nógv eftir at framføra størri tónaverk; men her í várhálvuni var tað a cappela sangur, t.e. sangur uttan fylgispæl, sum var setningurin. Kórið hevur nú 42 ár á baki, og í stóran mun verður konsertskráin afturlítandi: Umframt satsir á føriskum máli verður framførslan bæði í tíð og stað at meta sum ein kórljómandi ferð gjøgnum Europa við sangi á týskum, sveitsiskum, enskum, italskum og eisini onkrum á donskum máli. Konsertin er ókeypis og hon byrjar kl. 17.00.

# Vit skulu vera millumlið

**- Størsta uppgávan hjá okkum er at vera millumlið millum føroysku og bretsku stjórnina, sigur Sigmundur Isfeldt, føroyskur sendimaður í London**



*Sigmundur Isfeldt framman fyri donsku ambassaduni, sum eisini rúmar føroysku sendistovuni í London. Sum á øðrum ambassadum var vápnaður vaktur uttanfyri hurðina, sum einans kundi latast upp innanífrá*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SENDIMAÐUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er undarligt, sum tilvildin ofta kann ráða. Tað var ikki tilætlað, at vit á okkara Londonferð skuldu hitta føroyska sendimannin har, men soleiðis lagaði tað seg.

Eftir at vit høvdu sagt okkara guide farvæl fríggjadagin, gjørdu vit av at spáka eitt sindur runt í býnum »uppá egin hond«. Vit høvdu sjálvandi ikki peiling av, hvar vit vóru, so vit gingu bara. Knappliga síggja vit eitt føroyskt flagg veittra á einum bygningi. Tað vísti seg at vera danska ambassadan, har eisini føroyska sendistovan heldur til.

Tá vit soleiðis av tilvild rendu okkum á føroysku sendistovuna var tað sjálvsagt, at vit fóru inn at heilsa upp á.

Hóast føroyski sendimaðurin í London, Sigmundur Isfeldt, hevði úr at gera hendan dagin, tók hann sær stundir at tosa við okkum.

Føroyska sendistovan í London er ikki so gomul. Hon varð sett á stovn í 2002, og John Rajani var fyrsti sendimaður. Undan tí høvdu Føroyar eina sendistovu í Aberdeen, har Sofus Poulsen var føroyskt umboð í mong ár. Í dag fylgja føroyingar rákinum hjá øðrum londum, har siður er at skifta sendimenn út eftir stutt áramál, í føroyska førinum er tíðin trý ár. Og tað merkir so, at starvstíðin hjá Sigmundi Isfeldt er úti í summar.

Í øðrum londum er tað vanligt, at sendimenn verða sendir runt til ymsu sendistovurnar. Harvið verður bygd upp ein servitan innan uttanríkisráðið, tí tú fært sendimenn, sum kenna til øll øki, har landið hevur sendistovur, sigur Sigmundur Isfeldt.

### Persónligar kontaktir

Føroyska sendimanninum dámar væl í London, sum hann heldur er ein spennandi býur. Men har er eisini nógv viðurskifti at seta seg inn í, og hann metir, at man sum nýggjur má nýta eini tvey ár, áðrenn man kennir til alt viðkomandi á staðnum.

So persónliga haldi eg, at trý ár er í minna lagi. Tað kundi saktans verið eitt ár longri, sigur Sigmundur Isfeldt.

Tað krevur eisini sítt at flyta til annað land. Tað er jú ikki bara ein leysur kroppur, sum skal avstað.

Í mínum føri eru tað trý børn, sum skulu í skúla, so tað krevur sjálvandi sítt at fara við familju til annað land at búgva, sigur Sigmundur Isfeldt.

Starvið sjálvt er bæði spennandi og avbjóðandi. Og uppgávurnar mangar og fjøltáttaðar.

Men fyrst og fremst kann sigast, at uppgávan hjá sendimanninum er at vera millumlið millum føroysku og bretsku stjórnina, sigur Sigmundur Isfeldt.

Annars eru uppgávurnar ógvuliga ymiskar frá vanligum fyrispurningum frá fólki, sum ætlar sær at lesa í London til móttøkur og fundir.

Tað er sjálvandi eitt val at seta eina sendistovu á stovn. Tað ber jú eisini til at gera arbeiðið úr Føroyum. Men tá fært tú ikk tær persónligu kontaktirnar, sum eru so ótrúliga týdningarmiklar, sigur Sigmundur Isfeldt.

### Egin hølir

Føroyska sendistovan í London heldur til í tveimum leigaðum rúmum inni á donsku ambassaduni, og tað er synd at siga, at tað er rúmsháttt. Tí er tað eisini eitt ynski hjá føroyska sendimanninum, at sendistovan fær egin hølir við meiri plássi.

Ein av uppgávunum hjá okkum er at arbeiða fyri vinnulívinum, og mítt ynski er, at vit kundu havt eitt umboð frá teimum inni á sendistovuni hjá okkum, antin permanent ella í einari on-and-off skipan, sigur Sigmundur Isfeldt.

Hetta kundi verið gjørt við antikn at landið ella kanska vinnulívið sjálvt fíggjaði. Men við verandi hølisviðurskiftum ber hetta slett ikki til.

Tað starvast tvey fólk fast á sendistovuni, sendimaðurin sjálvur og so ein skrivstovukvinna. Tað er Sigga Jacobsen, sum býr fast í London. Men so er vanliga ein praktikantur eisini á sendistovuni, og tað hevur tað verið síðani Sigmundur Isfeldt gjørdist sendimaður.

So sendimaðurin sjálvur hevur annað hølið, meðan skrivstovukvinnan og praktikanturin sita í hinum.

Tað er væl hugsandi, at føroyska sendistovan í London fer at fáa egin hølir, tí stórur dentur varð lagdur á at sendistovan í Íslandi fekk egin hølir. Og nú vit hava fingið eitt uttanríkisráð burturav, og nú tosað verður um sendistovu í New York í egnum hølum, er væl hugsandi, at sama verður gjørt á sendistovuni í London.

Men fyribils mugu tey trý hjálpast við hølunum inni á donsku ambassaduni í London.




## Ata í praktikk á sendistovuni

SENDISTOVAN

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

*Ata Maria Bærentsen (tv), sum er í praktikk á føroysku sendistovuni í London, saman við Siggu Jacobsen og føroyska sendimanninum í London, Sigmundi Isfeldt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Líka síðani Sigmundur Isfeldt tók við sum føroyskur sendimaður í London hevur verið vanligt, at sendistovan hevur ein praktikant.

Praktikanttíðin er hálvt ár, og Ata Maria Bærentsen, sum lesur løgfrøði í Keypmannahavn, er sætti praktikanturin í røðini.

London er ein rættiliga friðarligur býur hóast støddina, men kortini skal ein ansa sær, serliga fyri lummatjóvum. Tað mátti Ata sanna tá ein slíkur hevði verið í mappuni hjá henni og tikið visakortið. Hon varnaðist hetta ikki, fyrr enn onkur tók taskuna hjá henni. Tá hon sperraði kortið varnaðist hon, at nógvar túsund krónur vóru úttiknar.

Men burtursæð frá hesi keðiligu hendingini dámar Atu sera væl býin og heldur, at tað er eitt njótilsi at vera í praktikk á føroysku sendistovuni í London.